


# Nýggj Ævintýraferð

**ÆVINTÝRAFERÐIN** **Tað er vorðin fastur táttur hjá hópatals barnafamiljum at hyggja at Ævintýraferðini við Búa Dam og Dánjali á Neystabø á ólavsøku. Aftur í ár verða framførslur fyri børn og vaksin, har bæði Grækaris Grashøvd og Paraply Harry vera við. - Hetta er besta Ævintýraferðin nakrantíð, sigur Búi**

Eydna Skaale


savnsmynd

Teir hava ferðast kring landið og havt 60 sera vælumtóktar sýningar. Men á ólavsøku taka teir endaspurtin á hesum sinni.

Búi sibbadibba dimdim duba daba Dam og Dánjal kagga dingding kagga dingding kagga dum plaga altíð at hava onkran gestaleikara afturat sær, og tað hava teir eisini í ár. Rógvi á Rógvu, sum serliga er kendur sum trummuleikari, hevur í ár ein stóran leiklut serliga við at gera tónleik til leikin.

- Vit hava altíð havt sjónleikarar afturat okkum, men í ár hava vit ein tónleikara. Og tað merkist eisini á sýningini, tí vit hava sera nógvan tónleik, greiðir Búi Dam frá.

## Besta ferðin nakrantíð

Ævintýraferðin er serliga kend fyri at draga børnini við og lata tey stýra ein part av søgugongdini. Men tað er nakað broytt í ár.

- Vit hava nú gjørt tað til eina sýning, har børnini meiri eru áskoðarar. Tey verða framvegis drigin við, men ikki í eins stóran mun, sum á undanfarnum Ævintýraferðum. Men vit hava lagt nógva orku í hesa Ævintýraferðina, vit hava nógvan tónleik og góð og flott ljóðføri, og so hava vit eisini havt ein leikstjóra, sum hevur lagt okkum lag á.

- Hetta er uttan iva tann besta Ævintýraferðin, vit hava gjørt, sigur Búi Dam, sum leggur afturat, at børnini hava verið spent og fylgt væl við, eisini hóast tey ikki hava ein eins stóran interaktivan leiklut hesuferð.

## Børnini eru fantastisk

Búi Dam heldur tað vera sera gevandi at spæla fyri og arbeiða við børnum.

- Børn eru púra erlig. Um tey ikki halda tað vera nóg gott, sum tú gert, so tíma tey ikki at hyggja. Og um teimum hinvegin dáma sýningina, so verður tú væl løntur afturfyri. Um tey eru við, so eru tey tað 100%. Og tað er fantastiskt, greiðir Búi frá.

Hann heldur, at hóast sýningarnar kring landið hava eydnast væl, so er tað altíð nakað serligt at framføra á ólavsøku.

- Øll eru so glað. Børnini hava fingið eina ballón og ein candyfloss, og tey vaksnu hava kanska eina lítla kenning, og tí plagar at tað vera garrvilt og lív í á ólavsøku.

Sýningarnar hjá Ævintýraferðini verða í Perluni í Tórsgøtu 28. – 31. juli kl 16 og kl 18 allar dagarnar. Í skránni stendur, at teir eisini spæla 27., men tað er ein villa, tí tá er ólavsøkukonsertin fyri.

eydna@sosialurin.fo



## Pál Weihe

granskari, ið gjørdi grinda–frámælið

**Hvat dámar tær, at fólk ikki fylgja tínum tilmælum, og hvør maður fer frá húsum í grind ?**
Man hevur jú ávarað ímóti royking í eina hálva øld, og tað er ikki fyrr enn nú, at tað byrjar at rigga. Og um okkara úrslit vísa seg at verða røtt, so verður tað helst fylgt einaferð. Um fólk læra seg at raðfesta.

**Hevur tú fingið tær eitt kók í summar ?**
Nei, tað havi eg ikki. Eg má royna at halda fast nú tá eg royni at ávarað ímóti tí. Nú skriva vit, at tað ikki er egnað at eta, so tað hevði verið løgið, um eg fekk mær eitt kók.

**Kundi tú hugsað tær at etið grind aftur?**
Mær dámar stak væl grind og havi verið í nógvum grindadrápum. Men eg má fyrihalda meg til okkara úrslit. Ein kann ikki bara verða síðbundin. So nei, eg fari ikki at fáa mær grind.

## Í MORGIN




Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og eitt skifti rregn, Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

## SUNNUDAGIN




Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men út á seinnapartin upp í stívt andøvsgul av suðri og um kvøldið regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.

## MÁNADAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og Ólavsøkuaftan:**
Týsdagin gul til stívt andøvsgul av útsynningi. seinnapartin upp í útnyrðing. Sólglottar, men eisini ælingur. Ólavsøkuaftan upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milluum 11 og 15 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1022 hPa. Við Hetland fer í landnyrðing. Eitt lágtrýst, 990 hPa. Svínas fyri Hvarvið fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr íslandi stendur mestsum í stað og brúgvalgið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 13. juli | Mánin næstur jørðini |
| 18. juli | Fyrra kvarter |
| 26. juli | Fullmáni |
| 29. juli | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. juli | 05:30 | 17:54 | 04:30 | 16:54 | 04:45 | 17:09 | 07:30 | 19:54 | 08:30 | 20:54 | 03:45 | 16:09 | 02:45 | 15:09 | 05:45 | 18:09 | 06:45 | 19:09 | 05:15 | 17:39 | 06:30 | 18:54 |
| 24. juli | 06:19 | 18:42 | 05:19 | 17:42 | 05:34 | 17:57 | 08:19 | 20:42 | 09:19 | 21:42 | 04:34 | 16:57 | 03:34 | 15:57 | 06:34 | 18:57 | 07:34 | 19:57 | 06:04 | 18:27 | 07:19 | 19:42 |
| 25. juli | 07:05 | 19:28 | 06:05 | 18:28 | 06:20 | 18:43 | 09:05 | 21:28 | 10:05 | 22:28 | 05:20 | 17:43 | 04:20 | 16:43 | 07:20 | 19:43 | 08:20 | 20:43 | 06:50 | 19:13 | 08:05 | 20:28 |
| 26. juli | 07:51 | 20:11 | 06:51 | 19:11 | 07:06 | 19:26 | 09:51 | 22:11 | 10:51 | 23:11 | 06:06 | 18:26 | 05:06 | 17:26 | 08:06 | 20:26 | 09:06 | 21:26 | 07:36 | 19:56 | 08:51 | 21:11 |
| 27. juli | 08:32 | 20:51 | 07:32 | 19:51 | 07:47 | 20:06 | 10:32 | 22:51 | 11:32 | 23:51 | 06:47 | 19:06 | 05:47 | 18:06 | 08:47 | 21:06 | 09:47 | 22:06 | 08:17 | 20:36 | 09:32 | 21:51 |